# Rennikapping í Vági



*Skipað varð fyri rennikapping í Vági í gjár. Feløgini Hvistan og Frælsur Ítróttur skipaðu fyri*

*(Mynd: Finn Johannessen)*

**Skipað varð fyri rennikapping í Vági í gjár. Feløgini Hvistan og Frælsur Ítróttur skipaðu fyri**

RENNING
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Hóast einans 10 luttakarar vóru við í rennikappingini í Vági leygardagin, so varð kappast í 4 bólkum. Nevnast kann, at tá umfar í kappingini var vesturi í Vágum í farnu viku, vóru eisini 10 luttakarar.

Vinnarar hesaferð í Vági vóru: hjá monnum Borgar Biskupstø, Treysti, hjá veteranum Josvein Herup Olsen, Bragdi, hjá kvinnum, Karina Magnussen, Hvistan, hjá gentum '91-'95, Bjørk Herup Olsen, Bragdi, og hjá dreingjum '91-'95, Johannes Kristensen, Bragdi.

Fyrireikararnir í felagnum í Suðuroynni, ið nevnist Hvistan, siga, at kappingin gekk væl og at næsta á skránni er flagdagsrenningin, ið er vorðið afturvendandi tiltak, og vænta tey tá um 100 luttakarar.

# Sunbeam komin á Vág



*Sunbeam stevnir inn á Vág*

*(Mynd: Finn Johannessen)*

**Leygardagin kom Sunbeam á Vág. Vágbingar hava keypt skipið úr Hetlandi og nøgv fólk var á bryggjuni og tók ímóti, tá skipið stevndi inn á Vág**

SKIP
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Eitt felag í Vági, V-Invest, hevur keypt størsta djúpvatnstrolara í Hetlandi.

Leygardagin kom skipið á Vág. Veðrið skikkaði sær væl, og sólin sá, tá Sunbeam klokkan 16 legði at bryggju í Vági.

Nøgv fólk hevði leitað sær á bryggjuna at taka ímóti skipinum. Kirstin Strøm Bech, borgarstjóri, heilsaði skipið, manning og eigarum vælkomnum og ynskti alt tað besta. Eisini vísti hon á, at navnið Sunbeam er ikki ókent í Vági, men mundi fyrsta skipið, sluppin, við hesum navninum vera í Vági longu fyrst í 1900 árunum.

Hans Joensen, Hans í Líðini nevndur, hevur verið skipari hesa fyrstu ferðina til Vágs og Conrad Gaard Joensen maskinmeistari. Teir lótu væl at túrinum og skipinum.

Skipið er 10 ára gamalt, nú tað er komið á føroyskar hendur.

# Ein rúgva av herverki

**Herverk er tað, sum fyllir mest í frágreiðingini hjá løgregluni um vikuskiftið, har millum annað 10 bilar stóðu fyri skotum. Ein kvinna síðst í 40-unum er handtikin í samband við herverk á nakrar av bilunum**




*Seinnapartin fríggjadagin vóru bæði løgregla og sjúkrabilur framvið Café Natúr í Havn, har ein ógvuliga drukkin maður gjørdi um seg. Í hurðini síggja vit, at hann verður borin út á børu*
*Mynd: Eirikur Lindenskov*

LØGREGLUTÍÐINDI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Ikki færri enn 10 bilar stóðu fyri skotum um vikuskiftið, har onkur hevur stytt sær stundir við at skøva síðurnar á teimum. Átta av fráboðanunum komu úr eysturbýnum, har flestu teirra høvdu staðið í Bókbindaragøtu.

Løgreglan gongur út frá, at herverkið á teir átta ymsu bilarnar hevur samband við hvørt annað, og teir hava eisini illgruna um, at hesir tilburðir møguliga hava samband við herverkið, sum varð framt á tveir aðrar bilar, sum stóðu á parkeringsplássinum aftanfyri løgreglustøðina í Jónas Broncksgøtu í Havn.

Tað var sunnukvøldið, at herverkið á teir báðar bilarnar aftanfyri løgreglustøðini varð framt. Her hevur løgreglan handtikið eina kvinnu síðst í 40-unum, sum er undir illgruna fyri at hava framt herverkið á teir báðar bilarnar, og møguliga eisini hinar skøvaðu bilarnar í eysturbýnum.

At bilarnir í høvuðsstaðnum veruliga hava staðið fyri skotum hetta vikuskiftið, máttu tríggir bileigarar á Traðarvegnum eisini ásanna leygarmorgunin, tá nummarplátur á bilum teirra vóru skræddar av.

Av herverki annars hava onkur smámál verið aftrat, sum altíð eru um vikuskiftið. Heldur ikki er tað óvanligt hjá løgregluni, at tey taka fólk inn við á støðina, sum hava verið ov drukkin, og hetta vikuskiftið hevði løgreglan fýra liggjandi gestir.

### Einki harðskapsmál ella rúsdrekkakoyring

Rúsdrekkakoyring og harðskapur plaga eisini at vera fastur táttur, men í so máta var hetta vikuskiftið eitt undantak. Fríggjamorgunin um fimmtíðina fór ein bilur útav vegnum við Sund. Trý fólk vóru í bilinum, sum gjørdist vrak, og førarin varð handtikin og skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring og at hava koyrt bil í frákenningartíðini, sum tað eitur.

Men síggja vit burtur frá hesum eina óhappinum, so tók løgreglan í Havn ongan fyri rúsdrekkakoyring, og ei heldur hava teir skrásett nakað harðskapsmál.



# Gøtubørn á vitjan í Havn

Hósdagin vóru børnini í skúlabólkinum í barnagarðinum í Gøtu á vitjan í høvuðsstaðnum. Børnini hava seinastu tíðina havt tema um mjólk. Tey hava millum annað verið á vitjan hjá bónda í Gøtu, og hósdagin var leiðin løgd til Havnar fyri at fáa meira at vita um mjólk.

Børnini vóru inn á gólvinum hjá Mjólkarvirki Búnaðarmanna, og har sóu tey, hvussu mjólkin verður latin í teir litríku mjólkarpakkarnar, og børnini sluppu sjálvsagt eisini at royna ymisku sløgini av mjólk og annað.

Eftir hesa vitjan fóru børnini í Norðurlandahúsið, har matpakkin varð etin. Síðani varð kósin sett í Vágsbotn, har børnini vitjaðu í Miðlahúsinum. Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum, tók ímóti, og hann bjóðaði bæði sodavatn og chips.

Børnini fóru eftir hetta væl nøgd norður aftur til Gøtu við Bygdaleiðum.

# Javnaðarflokkurin møtir veljaranum

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv frá Javnaðarflokkinum*

Undir heitinum »Flokkurin møtir veljarunum« fer Javnaðarflokkurin undir eitt landsfevnandi átak, har valdu umboð floksins fáa høvi at greiða frá, hvørji úrslit eru rokkin í valskeiðinum, sum nú fer at halla, og har veljarin fær høvi at siga sína hugsan um politikkin og úrslitini. Við á fundunum verða tingog landsstýrisumboð floksins.

Skráin ljóðar:
*Hesum fóru vit á val við*
*Hetta er komið burturúr*
*Hvat heldur veljarin.*

Øll eru vælkomin á fundirnar og nýggir limir kunnu tekna seg. Fyrsti fundurin verður í Arbeiðsmannafelagshúsunum í Leirvík mánakvøldið 5. mars kl. 20.

Hinir fundirnir í mars verða hildnir soleiðis:

Mikukvøldið 7. mars kl. 20: Dansistovan í Vestmanna.

Leygarkvøldið 10. mars kl. 19: Samljóð í Skopun.